SEA-STAR

# Skrivstovufólk

Vegna økt virksemið verður hervið søkt eftir einum fólki til skrivstovu okkara at arbeiða fulla tíð. Møguliga kann talan blíva um skrivstovulæruplláss, og í so fall, má umsøkjari hava HH ella FHS prógv.

Umsøkjarar við skrivstovuútbúgving og/ella royndum innan skrivstovuyrki hava fyrimun.

**Høvuðsuppgávurnar vera:**
- Bókhald
- Lønaravgreiðslur
- Og annað sum hoyrir skrivstovuyrkinum til

Til tíðir kann nógv vera at gera, so tí má umsøkjarin tola at arbeiða uttanfyri arbeiðstíð, um tað gerst neyðugt.

Ynskt verður, at tú byrjar skjótast gjørligt, men vit eru tó til reiðar at bíða eftir rætta umsøkjaranum.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Jan Danielsen, stjóra á tlf. 44 99 77 ella 74 99 77. Til ber eisini at senda teldupost til jandan@post.olivant.fo

Heldur tú at hetta er nakað fyri teg, so send eina umsókn saman við avritum av prógvum og viðmælum í seinasta lagi 22. juni 2007 til:

**SEA-STAR Contractors Spf.**
Heiðavegur 72, Box 220
FO-610 Saltangará
Viðmerk: "umsókn um skrivstovustarv"

**SEA-STAR Contractors** Spf. er eitt av nýggjaru byggifeløgunum í Føroyum. Vit hava uml. 40 fólk í starvi. Í løtuni hava hava vit nøkur byggiarbeiðir í Grønlandi, og nøkur í Føroyum. Eisini reka vit ein persónbilaverkstað. Afturat tí hava vit eitt felag, sum burturav tekur sær av kavaraarbeiði. Skrivstova okkara er í leigaðum hølum í Saltangará, men vit eru ígongd við at byggja bygning á Toftum, og tá hann er liðugur um vónandi eitt hálvt ár, verður skrivstovan flutt á Toftir.

VIÐAREIÐIS KOMMUNA

FO- 750 Viðareiði · T-postur: vid.kommuna@kallnet.fo
Tel: +298 451083 · Fax: +298 451094

## Lýsing eftir stuðli í farloyvisstarv til barn við serligum tørvi

Viðareiðis Kommuna søkir eftir stuðli at byrja 16/8 2007 og árið út, til 9 ára gamlan drong við serligum tørvi.

Starvið er eftir skúlatíð uml. frá 12.30 og er umleið 17 tíma um vikuna.

Arbeiðsuppgávan er at skapað umstøður so drongurin kann mennast kropsliga, málsliga, sosialt og mentalt.

Neyðugt er at umsøkjarin hevur bil so barnið kann koma til ymisk tiltøk.

**Vit ynskja at tú:**
- brennur fyri uppgávuni
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og tekur ábyrgd
- vilt samstarva við foreldur, børn, starvsfelagar og ymsar fakbólkar, ið eru knýttir at barninum.
- ert tolin
- ert áhugað/ur í at geva barninum ein mennandi gerandisdag

Lønin verður eftur sáttmálanum millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag og Føroya Pædagogfelag og lønt sum pedagogur/hjálparfólk á bústovni.

Um spurningar eru til starvið, ber til at venda sær til dagrøktarleiðarin á tlf. 588053

Umsóknin við møguligum prógvum/viðmælum skal verða okkum í hendi **í seinasta lagið 22. juni** og verður send til:

**Viðareiðis Kommunu**
750 Viðareiði



## Tofta skúli

Heygsveg 28 · FO 650 Toftum
Tlf. 447332 · fax 449532 · t-postur: tof@skulin.fo

## Lærarastørv og størv sum stuðul í Tofta skúla

Hesi størv verða lýst leys til setanar frá 1. august 2007 at rokna:

- **2 føst lærarastørv, fulla tíð, harav 1 vegna serligan tørv**
- **2 tíðaravmarkað lærarastørv, fulla tíð** fyri lærara í farloyvi, lækkað tímatal og serligan tørv
- **1 tíðaravmarkað lærarastarv uml. 17 t/v** endaliga tímaáseting av hesum starvi verður ásett eftir 1.september 2007
- **4 tíðaravmarkað størv sum stuðul** 3 størv eru 24 t/v og 1 starv er 23 t/v talan er um stuðul til næmingar, sum hava serligan tørv

**Skúlanum tørvar lærarar, ið kunnu átaka sær:**
- støddfrøði og føroyskt í framhaldsdeildini
- ítrótt í grund- og framhaldsdeildini
- danskt og enskt í grunddeildini
- handverk og list í grund- og framhaldsdeildini
- serligan tørv

**Vit vænta at tú:**
- ert fyrikomandi, umhyggin og engasjerað/ur
- ert fús/ur at taka á teg tær uppgávur sum eru í skúlanum
- í samstarvi við leiðslu og starvsfelagar vil vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Førleikakrøv:**
Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum/lærugreinaøkjum. Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so at tey, ið sett verða, eru tænastumannasettir lærarar frammanundan.

Lærarastørvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4

Størvini sum stuðlar verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir:**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlastjóranum í hendi **í seinasta lagi leygardagin 23.juni kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um størvini frá Maritu Dalsgaard, skúlastjóra á tlf. 447332 & 747765.

**Tofta skúli** hevur komandi skúlaár uml. 190 næmingar í 1. – 10.fl. og um 20 lærarar. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/tof/



## Ford ST til sølu.

Hálvt ára gamal Ford ST til sølu við 40.000 kr í avsláttri.

2,0 motor, 150 hk, sportleðursetur, klimaanlegg, el-rútar, originalt sóltak.

tónaðar rútar, tak-spoylara,16" alu-felgur v.m.

**Ring 50 55 50**

## Viðgerð fyri fobi

**Um tú hevur onkra fobi – er sera bangin fyri onkrum ávisum – kann tú fáa góða viðgerð fyri tí, samstundis sum tú lærir at viðgera teg sjálvan/sjálva.**

Viðgerðarskeið verður fríggjadagin tann 15. juni kl. 10,00. Max 6 luttakarir.

**Tilmelding á tlf. 318286 – 218286.**
**Best eftir kl. 19.00.**

JEGVAN BÆK SÁLARFRØÐINGUR



## Manglar tín fyritøka hús?

Frá 1. august 2007 verða møbleraði hús, mitt í Havnini, leigaði út.

**Nærri fæst at vita á tel. +45 30517532.**